# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um
# Maju Dalsgarð

Fríggjakvøldið var fitt av fólki savnað saman í samband við at kistan við Maju Dalsgarð kom út í Argja Kirkju.



Hesa løtuna í kirkjuni gjørdist eg knappliga greið yvir hvussu nógv okkara land, okkara fólk og kirkjan hevur mist, nú Maja er farin. Hon var ein bønarhetja burturav, ein andans stríðsmaður, altíð á varðhaldi líka til tað seinasta, nú hon varð tikin heim, 89 ára gomul.

Fyrstu ferð, eg var saman við Maju, var á einum altjóða kvinnubønarmøti í Frelsunarherinum. Nógvar kvinnur luttóku, men eg legði beinanvegin merki til hesa kvinnuna, sum hevði ein serligan myndugleika. Aftaná fekk eg at vita, at hetta var Maja Dalsgarð.

Seinni fekk eg tann frammíhjárætt at koma at kenna Maju, tí vit komu at virka saman í umleið 10 ár í landsleiðsluni hjá Woman`s Aglow. Maja var við til at stovnseta hendan tvørkirkjuliga felagskapin fyri kvinnur í Føroyum.

Í samband við hetta arbeiði er tað, eg kenni Maju best. Hon var ein stór fyrimynd fyri meg og fyri nógvar aðrar kvinnur. Hon var altíð fús at hjálpa, styrkja og biðja við kvinnum, sum høvdu tørv á tí, og tær eru nógvar, sum hava fingið hjálp í neyðini gjøgnum eitt orð frá Maju. Afturat hesum kann nevnast, at hon var serstakliga gestablíð.

Sjálv havi eg nógv at takka Maju fyri. Eg fari ongantíð at gloyma, tá hon kom inn á sjúklingahotellið á Ríkissjúkrahúsinum, og var saman við mær, meðan maður mín varð lagdur undir skurð, og tann tryggleika eg kendi við at vera saman við henni.

Tá eg hugsi um Maju og hennara lív, sum mangan hevur verið baldrut, tá stendur hon fyri mær, sum ein kvinna, sum varð vakt av Harranum sum ung og livdi í vekingini alt lívið.

Ein vegleiðari - ein fyrimynd er farin.

Eg fari tí at enda við hesum orðum:

"Minnist vegleiðarar tykkara. Aktið eftir hvussu teir endaðu lív sítt, og eftirfylgið so trúgv teirra!"

Ærað veri minnið um Maju Dalsgarð.

**Erna Háberg**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Annu Johansen**, Haldarsvík, fer úr Landssjúkrahúskapellinum í kvøld (mánakvøld) klokkan 18.30. Jarðarferðin verður úr Haldarsvíkar kirkju týsdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Annu kunnu lata Haldarsvíkar kirkju eina gávu.

**Elsa Joensen**, vanliga nevnd Elsa í Mortanstovu, Tórshavn, andaðist á Láargarði fríggjadagin 19. august, 84 ára gomul. Bønarhald verður á Lágargarði í kvøld (mánakvøld) klokkan 18.00. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju týsdagin klokkan 13.00. Tey ið vilja minnast Elsu, kunna lata eina Lágargarði eina gávu, konto í peningastovnunum.

Kistan við A**nnu Jacobsen**, Leirvík, fer úr Landssjúkrahúskapellinum í dag (mánadag) klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju týsdagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

**Svenny Vang**, ættað úr Froðba, andaðist sunnudagin 21. august á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, 84 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikudagin 24. august klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju hósdagin 25. august klokkan 15. Tey, sum vilja minnast Svenny, kunnu lata Tvøroyrar kirkju eina gávu.

**Emmely Forná**, Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 21. august, 74 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Ingibjørg Holm**, Hvalba, ættað úr Sandvík, andaðist 21. august á Landssjúkrahúsinum, 70 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 11 til Smyril. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13.30 úr Sandvíkar kirkju. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Ingibjørg, kunnu lata Sandvíkar kirkju eina peningagávu.

**Judith Lilholm Nielsen**, ættað úr Havn, búsitandi í Vanløse, andaðist 17. august, 80 ára gomul. Jarðarferðin verður týsdagin 23. august klokkan 14:30 úr Husumvald kirkju í Keypmannahavn. Andlát Karl Hilmar Olsen, vanlig kendur sum Karl á Báruni, andaðist í heiminum hósdagin 11. august, 61 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

# Fróði keypt amboðsdeildina hjá Thomas Dam

**Leygarkvøldið 20. august keypti "P/F Hjá Fróða" amboðshandilin "Thomas Dam Amboð & Maskinur" í Jónas Broncksgøtu í Havn frá Meinhard Dam. Fróði Sigvardsen verður nýggjur stjóri í handlinum**




*Thomas Dam (v.m.), sum hevur tikið sær av søluni av handlinum fyri pápan, Meinhard Dam, sum er burturstaddur í løtuni, og Fróði Sigvardsen, nýggjur eigari av P/F Thomas Dam Amboð & Maskinur*

*Mynd: Bárður Lydersen*

HANDIL

P/F Hjá Fróða, v. Fróða Sigvardsen í Havn, hevur keypt amboðshandilin "Thomas Dam Amboð & Maskinur" í Jónas Broncksgøtu frá Meinhard Dam.

Fróði Sigvardsen, frá P/F Hjá Fróða, sigur, at hann hevur keypt handilin, men ikki bygningin. Teir hava gjørt eitt leigumál við P/F Handilsvirki Thomas Dam, og starvsfólkini halda fram sum áður.

P/F Hjá Fróða hevur umframt ein málingahandil í Havn, eina deild í Runavík, og so reka teir handilin Norðoya Litbúð saman við Harley Bertholdsen í Klaksvík.

Amboðshandilin hevur skjótt 50 ár á baki. Tað var Thomas Dam sum stovnaði handilin í 1946. Fyrstu mongu árini var amboðsdeildin í N. Finsensgøtu, har sum Thomas Dam Ítróttur er í dag, og í 80-unum var flutt í nýggjan handilsbygning í J. Broncksgøtu.

Í tíðindaskrivi frá handlinum verður sagt: " P/F Thomas Dam Amboð & Maskinur hevur altíð lagt seg eftir at veita kundum sínum eina góða tænastu, og tí gleðir tað okkum at vit við hesum handli tryggja at amboðshandilin eisini fram yvir kann vera ein professionellur og álítandi samstarvsfelagi hjá kundum okkara. Fróði er ikki ókendur innan handilsvinnuna í Føroyum, og við hesum keypi hevur hann víðkað sítt virkisøki til eisini at umfata amboð og maskinur til bæði tann professionella brúkaran og hobbymannin".

## Gullbrúdleyp

Leygardagin 3.sep kunnu hjúnini Elsa og Jógvan Petersen, Kollafjørður halda gullbrúdleyp.

Tey, ið vilja gleða parið, eru hjartaliga vælkomin í Missiónshúsið í Kollafirði millum kl. 10 og 14.

## Dagurin

**23. august. Sakeus**, deyður umleið ár 116. Í elsta listanum yvir biskupar í Jerúsalem verður nevndur ein Sakeus, sum er tann fjórði í tí biskupatalinum, men annars ókendur. Summir halda, at her verður sipað til yvirtollaran Sakeus (Luk. 19, 1-6). Navnið merkir *reinur* ella *sakleysur*.

Hundagarar enda.